## Starv

# Samferðsluleiðari

Starvið sum leiðari á Samferðsludeildini hjá Strandfaraskipum Landsins verður hervið lýst leyst at seta frá 1.juli 2009, ella eftir nærri avtalu.

**Samferðsludeildin**
Uppgávan hjá Samferðsludeildini er at samskipa og menna fólka- og farmaflutningstænastuna hjá Strandferðsluni. Arbeiðsøkið er m.a.: Ferðaætlan, prísskipan, útbjóðing, ferðaseðlaskipan, rutuupplýsing og farmaflutningur.

**Uppgávurnar hjá leiðaranum**
Samferðsluleiðarin skal tryggja ein effektivan rakstur, og áseta og stýra fíggjarligu karmunum innan tænastuframleiðsluna. Harumframt skal leiðarin tryggja framhaldandi menning av deildini.

Starvið er breitt og spennandi, har tú eisini kemur at arbeiða við fakligum uppgávum innan felagsferðslu, herundir analysur, planlegging og dagliga samskipan.

Arbeiðið á deildini er í stóran mun skipað við verkætlanum.

**Førleikakrøv**
- Útbúgving ella royndir innan logistikk, búskap og ferðslustýring e.l..
- Kunnleiki og royndir viðvíkjandi flutningsskipanum
- Kunnleiki og royndir innan edv á høgum brúkarastøði
- Royndir í projektleiðslu
- Arbeiðir miðvíst og hevur analytisk evni
- Góð leiðslu- og samstarvsevni
- Góð evni at orða seg bæði skrivliga og munnliga á føroyskum, donskum og enskum.

**Setanartreytir**
Talan er um eitt leiðarastarv við stórum og spennandi avbjóðingum, har leiðarin fær ábyrgdina av at menna eina týdningarmikla funktión. Starvið gevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

Starvið er lønt í 35. lønarflokki eftir lønartalvuni hjá Tænastumannafelagnum, tó uttan at starvið er tænastumannastarv.

**Umsóknir**
Umsóknir saman við prógvum, C.V. og møguligum ummælum skulu sendast til:

***Strandfaraskip Landsins***
*Sjógøta 5*
*Boks 30*
*FO-800 Tvøroyri*

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 24. apríl 2009, kl. 12:00.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Boga Mortensen, stjóra, á tlf. 34 30 00, ella e-post: bmo@ssl.fo

Strandfaraskip Landsins er ein landsfyritøka undir Vinnumálaráðnum, og hevur sum endamál at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi.

Fyritøkan umsitur 29 farleiðir (22 Bygdaleiðir og 7 Oyggjaleiðir).

Talið á flutningsanleggum eru 40 bussar og 8 ferjur.

Samlaða talið á starvsfólkum á SL svara til 120 ársverk.

STRANDFARASKIP LANDSINS



# Sethús í Fuglafirði til sølu

**Húsini standa væl fyri, miðskeiðis í bygdini.**

**Áhugað kunna venda sær til:**

**221109, 775049 ella 213773**

# Framsýning av gomlum myndum av Argjum verður í Róðrarneystinum á páskum

Hevur tú áhuga í fortíð bygd okkara, so sum gomlum húsum, fólkamyndum, ættarbondum, serligum hendingum, staðarnøvnum ella hevur tú spurningar hesum viðvíkjandi? So ert tú vælkomin í neystið á páskum.

**Opið verður soleiðis:**
Leygardagin 11. apríl, páskadag og 2. páskadag
Allar dagar frá kl. 15.00 - 20.00

**Áhugafelagið**



# Húsvognar til sølu

Vit hava 2 leiguvognar til sølu við sera góðum avsláttri. Vognarnir hava 12v skipan, fortelt og annars alt ið krevst til kampingtúrin.

**Ring 218 540**

# Eiðis Arbeiðsmannafelag

Lýst verður til **eykaaðalfund** týsdagin 21. apríl kl. 18.00 í kantinuni á Norðís.

**Skrá:** *Íløguheimild í sambandi við umfígging av Norðís.*

*Eiði, tann 6. apríl 2009*

**Nevndin**

abc BARNAHJÁLPIN



ABC Barnahjálp hevur ársfund í Miðlahúsinum 28. apríl klokkan 19.30.

Á skránni verður frágreiðing og myndasýning frá ferðini í Liberia.

# Umboðsráðsvalið

ið lýst var at verða hósdagin 16. apríl 2009, er avlýst.

**HAVNAR SJÚKRAKASSI**

## Ein av týdningarmiklu fiskivinnuhendingunum í Europa

Fish Expo Faroes 2009 er staðið, har skiparar og reiðarar úr fiskivinnuni í øllum Europa hittast at útvega sær nýggjar vørur og at netverka við starvsfelagar úr vinnuni.

Hetta er eitt einastandandi høvi at sýna fram nýggjar vørur og tænastur fyri altjóða fiskiflotanum og vinnuni.

**Vælkomin á Fish Expo Faroes 2009**